## Roykiforboð økir spirituskoyring



Ein amerikansk kanning vísir, at roykiforboð á vertshúsum merkir fleiri spiritusførarar á vegunum. Í teimum umráðunum í USA har roykiforboð er sett í verk á ølstovum, hava myndugleikarnir skrásett eina øking upp á 12% í spiritusrelateraðum óhappum. Sambært kanningini eru tað alt fleiri, sum koyra longri fyri at finna ølstovur, har tey bæði kunnu drekka og roykja. Tey, ið hava gjørt kanningina, mæla tí til, at myndugleikarnir viga fyrimunirnar við roykiforboði upp móti øktu ferðaluvanlukkunum, skrivar berlinske.dk

## Íslendska krónan styrknað

Íslendski búskapurin er góður og íslendsku bankarnir eru væl fyri. Tað sigur Ingimundur Friðriksson frá íslendska tjóðbankanum við Børsen. – Búskapuin er grundleggjandi sunnur, sigur Friðriksson og vísir á, at yvirskot er á fíggjarlógini, og at útflutningurin er í stórari øking serliga orsakað av fiski og aluminium. Íslendska krónan er tann valuta, ið hevur staðið seg ringast mótvegis evruni, men gongdin er kortini vend fyri eina stund nú og er hækkað 1% aftrat.

# Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar komin

**Arbeiðsbólkurin sum varð settur at gera at gera eina ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar, eftir at Landsstýrið í 2006 setti Visjón 2015 út í kortið, er nú liðugur við arbeiði sítt og »Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2008 til 2015« er komin**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá Føroya Landsstýri í 2006 setti út í kortið við Visjón 2015 var eitt av aðalmálunum at tað skal vera trygt at ferðast í Føroyum. Talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða skuldi verða 30 prosent minni í 2015 enn í 2006. Málið er eisini grundað á nullhugsjónina, sum er samtykt í Løgtinginum.

Ein bólkur varð settur av landsstýrismanninum við vinnumálum 25. juni 2007 at gera ta fyrstu ferðslutrygdarætlanina fyri Føroyar. Bólkurin er nú liðugur við arbeiði sítt og »Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2008 til 2015« er veruleiki.

Arbeiðið byrjaði við at ein verkætlan varð skipað við einum stýrisbólki og einum arbeiðsbólki. Í stýrisbólkinum sótu umboð fyri Vinnumálaráðið, Akstovuna, Landsverk, løgregluna, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag og Ráðið fyri Ferðslutrygd. Í arbeiðsbólkinum sótu umboð fyri Landsverk, kommunurnar, løgregluna og Ráðið fyri Ferðslutrygd.

Sølvi Reinert Hansen, stjóri, og Høgni í Stórustovu, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, siga, at málið er, at hendan ferðslutrygdarætlan komandi árini verður stavnhald hjá landi, kommunum, feløgum, fyritøkum, einstaklingum og øðrum, sum eru við í arbeiðinum fyri størri trygd á føroyska vegakervinum. Men skal ynskið gerast veruleiki, er tað ein fyritreyt, at fólk taka hana til sín og gerast partur av henni.

Vónin er, at arbeiðið, sum skjøtil er settur á, í hesum bólki, kann halda áfram, so at ferðslutrygdarætlanin áhaldandi verður kannað og eftirmett fyri møguliga at seta nýggj mál ella mæla til onnur tiltøk og átøk fyri at koma nærri málinum í nullhugsjónini.

»Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2008 til 2015« er upp á 46 síður við 35 ymiskum tilmælum fyri at betra um ferðslutrygdina í Føroyum.

Samanumtikið gerst einki, um ikki hvør einstakur tekur ábyrgd av ferðslutrygdini, siga Sølvi Reinert Hansen og Høgni í Stórustovu frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd.



*Sølvi Reinert Hansen, stjóri, og Høgni í Stórustovu, formaður í Ráðnum fyri ferðslutrygd*
*Mynd: Jens Kristian Vang*